**Tíðindaskriv frá Føroya Handverkarafelag**

# Lærlingar rætt til ferðastuðul?

Við einum nýggjum dómi hevur Føroya rættur staðfest, at lærlingar hjá Føroya Handverkarafelag hava rætt til ferðastuðul.

Ein maskinsmiðjulærlingur søkti í 2006 og 2007 um stuðul til ferðaútreiðslur eftir løgtingslóg um stuðul til ferðaútreiðslur fyri tíðarskeiðið, sum maskinsmiðjulærlingurin var á Tekniska skúla í Tórshavn.

TAKS noktaði at rinda maskinsmiðjulærlinginum stuðul, tí hann var í skúla og lógin gevur einans rætt til stuðul til ferðaútreiðslur millum bústað og arbeiðsstað.

Eftir at viðkomandi kærumyndugleiki hevði givið lærlinginum viðhald, legði TAKS málið fyri Føroya rætt, har m.a. varð víst á, at Føroya rættur í einum úrskurði frá 2005 hevði fingið staðfest, at ein sjúkrarøktarfrøðilesandi ikki hevði rætt til ferðastuðul, meðan viðkomandi var í skúla.

Føroya rættur er nú komin við einum nýggjum prinsipiellum dómi, har lærlingurin fekk viðhald í, at hann hevur rætt til ferðastuðul fyri tíðarskeiðið, meðan hann er á Tekniska skúla.

Advokaturin hjá Føroya handverkarafelagi, Djóni Thomassen, upplýsir at Føroya rættur legði dent á, at tað er ein munur á lærlingum og lesandi og valdi tí at geva maskinsmiðjulærlinginum viðhald.

Djóni Thomassen advokatur sigur eisini, at hesi munurin í stuttum kann síggjast í tí, at lærlingar í høvuðsheitum eru í læru, meðan ein partur er teoretisk útbúgving, har teir eru í skúla, meðan eitt nú sjúkrarøktarfrøðilesandi í høvuðsheitum ganga í skúla, meðan ein partur av útbúgvingini er verkligur.

Av somu orsøk staðfesti Føroya rættur, at handverkaralærlingar hava rætt til stuðul til ferðaútreiðslur í tí tíðarskeiði, teir eru í skúla.

Føroya Handverkarafelag metir, at talan er um ein prinsipiellan dóm, ið hevur stóran týdning fyri allar lærlingar í handverkaravinnuni.

TAKS hevur eftir øllum at døma tikið dómin til eftirtektar, tí TAKS hevur í dag kunngjørt á heimasíðu síni, at TAKS hevur broytt praksis frá 1. januar 2010, soleiðis at lærlingar fáa ferðastuðul fyri bæði verkliga og ástøðiliga partin av útbúgvingini.

Saltangará, tann 23. juni 2010

Vegna Føroya handverkarafelag

Henry Olsen, formaður